tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt:Kristin Michelsen, Bjarni Hammer, Anita Vibergsdóttir, Bogi Johannesen, Alvi Mortensen, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen
Skrivari:Henrik Weihe Joensen (Pkt. 1-10), Lasse Jensen (Pkt 11-14)

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Skattatøl mai mánaða | 3 |
| 2 | Nýggj tilbúgvingarstøð í Tvøroyrar kommunu | 3 |
| 3 | Umrøða møguleikar fyri onnur høli til kommunulækna-virksemi | 5 |
| 4 | Varðin Pelagic - tekningar av kaiini til góðkenningar. | 6 |
| 5 | Uppskot til reglugerð í sambandi við veitan av stuðli frá Tvøroyrar kommunu | 7 |
| 6 | Ársaðalfundur hjá IRF 2018 til umrøðu | 8 |
| 7 | Eftirmeting í.s.v. at kantina hevur havt opið 2 dagar um vikuna | 9 |
| 8 | Vaskifólk til kommunulækna-avloysarar | 10 |
| 9 | Uppskot til ferðavinnupolitikk hjá Tvøroyrar kommunu | 11 |
| 10 | Borgarstjórin hevur í uppskoti, at hækka aldursmarkið fyri kommunal starvsfólk til 70 ár | 12 |
| 11 | Rokning frá MEST í.s.v. eldsbrunan á Varðanum Pelagic 9. juni 2017 | 13 |
| 12 | Ávísa økið til Froðbiar Sóknar Róðrarfelag (FSR) | 13 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

13 Viðurskifti við atliti til Snaruna 15

14 Val av nevndarlimum í Eftirskúlan 16



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-I00-1-18**

## 1. Skattatøl mai mánaða

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri mai mánaða samanborið við skattatølini higartil í ár.

### Skjøl

- Skattatøl í mai mánaða 2018

**14.06.00-A00-2-18**

## 2. Nýggj tilbúgvingarstøð í Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

**Tekniska deild mælir til, 28. maj 2018, pkt. 5:**
Tilmæli frá býarverkfrøðinginum er viðheft.

**Tekniska nevnd, 28. maj 2018, pkt. 5:**
Nevndin mælir til at staðseta tilbúgvingarstøðin á matr. nr. 34 í Øravíkarlíð.

### Avgerð

Býráðið atkvøddi um tilmæli frá teknisku nevnd 12. juni 2018 viðvíkjandi staðseting av tilbúgvingarstøð og útbjóðingartilfarinum:

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Broytingaruppskot frá Kristinu Roest um at tilbúgvingarstøðin verður boðin út sum fakenterprisa ístaðin fyri høvuðsenterprisa. Býráðið atkvøddi um broytingaruppskoti fyrst.

Býráðið samtykti broytingaruppskoti við 6 atkvøðum fyri: Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen. Borgarstjórin atkvøddi ikki í málinum. Broytingaruppskotið er sostatt samtykt av býráðnum.

Borgarstjórin hevði hesa viðmerking til broytingaruppskoti:

"Borgarstjórin helt tað vera løgið, at tilmæli kemur frá teknisku nevnd 12. juni 2018 um at støðin verður boðin út sum høvuðs-arbeiðstøka og nú á býráðsfundinum verður broytt til fakenterprisa, tí tað er einki garanti fyri, at entreprenørar í norðaru helvt av Suðuroynni fáa arbeiði".

Kristina Roest viðmerkti til málið:

"Kristina Roest segði, at hennara broytingaruppskot ikki fevndi um entreprenørar í norðaru helvt men at talan var um at fáa arbeiði boðið út sum fakenterprisa líkasum útbyggingin av barnagarðinum verður boðin út"

Bjarni Hammer ynskir at viðmerkja til málið:

"Bjarni Hammer segði, at tað er gleðiligt, at tekniska nevnd nú er komin við einum tilmæli, sum ger, at ein staðseting av tilbúgvingarstøðini er komin uppá pláss, og sum meirluti er fyri".

Alvi Mortensen ynskir at viðmerkja til málið:

"Alvi Mortensen segðí, at tað er gleðiligt, at staðsetingin av tilbúgvingarstøðini nú er komin uppá pláss aftaná at arbeitt hevur verið við málinum í 1,5 ár".

**Skjøl**

- tilstandsrapport
- Tilmæli: Staðseting av tilbúgvingarstøð.
- Kostnaðarmeting tilbúgvingarstøð

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**29.00.00-A00-1-17**

## 3. Umrøða møguleikar fyri onnur høli til kommunulækna-virksemi

### Málsfrágreiðing

Sosiala nevnd ynskir Tvøroyrar býráð til at umrøða møguleikar fyri onnur høli til kommunulækna-virksemi á Tvøroyri.

**Sosiala nevnd, 28. marts 2018, pkt. 3:**
Sosiala nevnd samtykti at mæla fíggjarnevndini og býráðnum til, at tær ábøtur á kommunulæknahølið, sum peningur er settur av til, verða framdar skjótast gjørligt sambært tí tekning, sum Lasse Jensen hevur gjørt.

**Sosiala nevnd, 25. maj 2018, pkt. 3:**
Sosiala nevnd umrøddi møguleikan, at fáa sær onnur høli til kommunlækna-viðtalur á Tvøroyri eitt nú bleiv bygningurin hjá Posta/BankNordik nevndur. Núverandi hølir eru ikki góð og ein loysn má finnast.

Sosiala nevnd beindi málið til viðgerð á fyrstkomandi býráðsfundi.

### Avgerð

Kristina Roest hevur eitt tilmæli um, at eitt umboð fyri meirlutan í býráðnum - í hesum førinum formaðurin í teknisku nevnd, Bjarni Hammer - og leiðarin í teknisku deild Ragnar Juul Guttesen fáa heimild til at tosa við Posta um møguligan prís fyri bygningin hjá Posta á Tvøroyri fyri síðani at venda aftur til teknisku nevnd og býráðið við kunning um úrslitið av hesum tosið.

Anita Vibergsdóttir hevur eitt tilmæli um, at tekniski leiðarin Ragnar Juul Guttesen saman við borgarstjóranum og formanninum í teknisku nevnd Bjarna Hammer fara í eitt samskifti við Posta við sama endamáli sum nevnt er í tilmælinum frá Kristinu Roest.

Alvi Mortensen hevur eitt tilmæli um, at forkvinnan í sosialu nevnd fer at tosa við sjúkrahússtjóran Ronnie Midjord um hvat støðan er við verandi kommunulæknahøli.

Tilmæli frá Kristinu Roest: Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer atkvøddu fyri. Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu ímóti.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Tilmæli frá Anitu Vibergsdóttir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri tilmælinum. Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer atkvøddu ímóti.

Tilmæli frá Alva Mortensen: Býráðið samtykti einmælt tilmæli frá Alva Mortensen.

Kristina Roest viðmerkti til málið:

"Kristina Roest upplýsti, at hon helt tað vera sera óheppið, at málið um posthús-bygningin onga nevndarviðgerð hevur fingið, tá borgarstjórin hevur arbeitt við málinum sambært kommunustjóranum".

Kristin Michelsen viðmerkti til málið:

"Kristin Michelsen upplýsti, at hann vil staðiliga afturvísa uppáhaldið hjá Kristinu Roest".

## Skjøl

- Dagsordenspunkt: Støðulýsing um kommunulæknaviðurskifti í Suðuroynni behandlet på mødet 25. maj 2018 kl. 15:00 (Býráðsskrivstovan) i Sosiala nevnd (2018).docx

**02.34.02-G01-13-17**

## 4. Varðin Pelagic - tekningar av kaiini til góðkenningar.

### Málsfrágreiðing

**Vinnu- og havnanevnd, 3. april 2018, pkt. 2:**
Nevndin tekur undur við at góðkenna tekningar, men vil at ognarviðurskiftini skulu staðfestast áðrenn endaliga góðkenningin verður latin.

### Tilmæli:

Um Varðin skal eiga kaiina, skulu inntøkur frá innskiping (útflutningi) fella til kommununa.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og málið verður beint aftur í vinnu- og havnanevndina til viðgerðar.

### Skjøl

- umsøknarskriv frá Varðanum
- Tekning nr.500a kaiplanur
- Tekning nr.403 Tværskurður
- Tekning nr.402
- Tekning nr.401 75 pullart-ALTERNATIV 1
- Dagsordenspunkt: Varðin Pelagic - tekningar av kaiini til góðkenningar. behandlet på mødet 3. april 2018 kl. 14:30 (Býráðsskrivstovan) i Vinnu- og havnanevnd (2018).docx
- Dagsordenspunkt: Varðin Pelagic - tekningar av kaiini til góðkenningar. behandlet på mødet 3. april 2018 kl. 13:00 (Býráðssalurin) i Tekniska nevnd (2018).docx

**00.01.00-A00-4-18**

## 5. Uppskot til reglugerð í sambandi við veitan av stuðli frá Tværoyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Uppskoti til reglugerð viðvíkjandi skipan av viðurskiftum við atliti til stuðulsumsóknir eru nú tillagað samsvarandi samtykt á síðsta býráðsfundi, sí viðfesta uppskot.

**Fíggjarnevndin, 3. maj 2018, pkt. 4:**
Fíggjarnevndin samtykti, at taka undir við tilmælinum frá Súsonnu Bertholdsen um at gera eina reglugerð/mannagongd í sambandi við avgreiðan av stuðulsumóknum, sum koma inn til Tværoyrar kommunu. Umsitingin ger reglugerðina klára til komandi býráðsfund til góðkenningar.

**Býráðið, 22. maj 2018, pkt. 3:**
Býráðið samtykti, at góðkenna reglugerðina við nøkrum viðmerkingum, sum skulu skrivast inn í reglugerðina til góðkenning á býráðsfundinum 4. juni 2018.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri



| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Avgerð**

Býráðið samtykti einmælt, at góðkenna reglugerðina.

**Skjøl**

- Samskifti millum Súsonnu Bertholdsen og kommunustjóran
- Tilfar um stuðulsumsóknir - kunning frá Súsonnu Bertholdsen
- Uppskot til reglugerð um veitan av stuðli frá Tvøroyrar kommunu

**00.01.10-I00-11-17**

## 6. Ársaðalfundur hjá IRF 2018 til umrøðu

**Málsfrágreiðing**

Borgarstjórin ynskir til umrøðu frágreiðing frá ársaðalfundi hjá IRF tann 20. apríl 2018, sí viðfestu frágreiðing.

**Avgerð**

Býráðið tók kunningina til eftirtektar. Borgarstjórin hevði hesa viðmerking til málið:

"Kristin Michelsen segði, at hækkingin í samsýningum til nevndina í IRF fór at geva eykaútreiðslur til Tvøroyrar kommunu".

**Skjøl**

- scan.pdf

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.01.00-5-17**

## 7. Eftirmeting í.s.v. at kantina hevur havt opið 2 dagar um vikuna

### Málsfrágreiðing

Samsvarandi tilmæli frá mentanarnevndini og samtykt hjá býráðnum hevur Anita Farstad havt opið 2 dagar um vikuna á kvøldartíð í kantinuni í ítróttarhøllini í Trongisvági frá 1. januar í ár. Hetta í eina 6. mánaða royndartíð, sum gongur út 30. juni í ár.

Borgarstjórin ynskir nú at eftirmeta hesa royndartíð.

### Tilmæli:

**Mentanarnevndin, 31. maj 2017, pkt. 1:**
Mentanarnevndin umrøddi leigusáttmálan, sum Súsanna Bertholdsen hevði nakrar spurningar til.

Mentanarnevndin samtykti, at innkalla leigaran Anitu Farstad til komandi fund í mentanarnevndini eisini við atliti til at spyrja Anitu Farstad, um hon hevur møguleika til at hava opið um kvøldarnar í sambandi við vanliga venjing.

**Mentanarnevndin, 28. august 2017, pkt. 5:**
Mentanarnevndin samtykti, at tað verður skipa eitt hugnaligt umhvørvi í forhøllin í Trongisvági, har ungdómar kunnu sita og práta í sambandi við venjingar í høllini. Í samráði við húsavørðin skal møguliga keypast útbúnaður til brúk í forhøllini. Hallarvørðurin verður boðin á fund í hesum sambandi.

**Mentanarnevndin, 30. november 2017, pkt. 2:**
Mentanarnevndin samtykti einmælt, at bjóða Anitu Farstad, at hava opið í kantinuni 2 dagar um vikuna týsdag og tórsdag í tíðarbilinum 17:00-21:00 fyri tímaløn sambært galdandi sáttmála, at byrja pr. 1. januar 2018 við eini royndartíð á 6 mánaðir, tá hetta tiltak skal endurskoðast.

Mentanarnevndin viðmerkti annars vísandi til § 8 í sáttmálanum millum Tvøroyrar kommunu og Anitu Farstad, at Anita skal hava opið í kantinuni, tá ítróttartiltøk eru í høllini.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið beindi málið til fyrstkomandi fund í mentanarnevndini.

### Skjøl

- Kantina_sattm.pdf
- Dagsordenspunkt: Uppskot til setanarbræv Anita Farstad behandlet på mødet 29. december 2017 kl. 12:00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2017).docx

**82.03.00-Ø54-1-18**

## 8. Vaskifólk til kommunulækna-avloysarar

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin ynskir at umrøða skipanina við vasking av hølum, har kommunulækna-avloysarar húsast á Tvøroyri.

**Fíggjarnevndin, 28. februar 2018, pkt. 2:**
Eftir upplýsingum frá Pólu, er vaskimaskina og sjónvarp í leigumálinum.
Samtykt at taka undir við hesum leigusáttmála fyri árið 2018 áljóðandi kr. 6.000,00 incl. ljós og hita.

**Býráðið, 5. marts 2018, pkt. 5:**
Býráðið tók kunningina frá fíggjarnevndini til eftirtektar.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnaði um samtykt hjá fíggjarnevndini frá 28. mai 2013 um, at reingerðarfólk til høli hjá kommunulækna-avloysarar verða funnin millum teir avloysarar, sum kommunan hevur frammanundan. Borgarstjórin mælti tí til, at ógilda samtyktina hjá fíggjarnevndini tann 22. mai 2018, sum ásetir, at starvið sum reingerðarfólk skal lýsast leyst at søkja.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 7-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Atkvøðugreiðsla um tilmæli frá borgarstjóranum: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri. Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen og Bjarni Hammer atkvøddu ímóti tilmælinum frá borgarstjóranum, sum tískil fall.

### Skjøl

- Kunning um samtykt hjá fíggjarnevndini, send fíggjarleiðaranum til víðari avgreiðslu
- Dagsordenspunkt: Leigusáttmáli viðv. sethúsum til kommunulækna-avloysarar til góðkenningar behandlet på mødet 22. maj 2018 kl. 16:00 (Býráðsskrivstovan) i Fíggjarnevndin (2018).docx

**24.05.00-P20-1-17**

## 9. Uppskot til ferðavinnupolitikk hjá Tvøroyrar kommunu

### Málsfrágreiðing

Uppskot til ferðavinnupolitikk fyri Tvøroyrar kommunu er gjørt liðugt og skal viðgerðast av Tvøroyrar býráð, sí viðfesta uppskot og viðkomandi skjøl annars.

**Vinnu- og havnanevnd, 16. maj 2018, pkt. 1:**
Nevndin viðgjørdu uppskotið til ferðavinnupolitikk.

Høvuðsøki 1: Hvør ger útinnir í verki gerð av produktkatalogi, felags snið fyri Suðuroynna, og talgilding av bíleggingum? Hvør skal framhaldandi eftirmeta og menna produktkatalogið?

Høvuðsøki 2: Hvør skal endurhugsa nýggjan bygnað fyri kunningarstovuna?

Høvuðsøki 3: Nevndin skilir tað soleiðis, at menningardeildin undir Visit Faroe Islands er í holt við at gera skeltisætlan og ætlan fyri kunningartalvur. Kunningarstovan umhugsar gerð av faldarum.

Høvuðsøki 4: Hvussu skal hetta ítøkiliga fremjast í verki?

Høvuðsøki 5: Nevndin eftirlýsir at fáa professionel ráðgeving til eyðmerking av viðkomandi røkum.

Høvuðsøki 6: Her eftirlýsir nevndin eisini professionel ráðgeving.



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Høvuðsøki 7: Ongar viðmerkingar

Høvuðsøki 8: Kommunan hevur ikki sum er heimild til gera leiðreglur, men tað kann gerast í samstarvi við haga-eigarar.

Høvuðsøki 9: Ongar viðmerkingar.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt uppskot til ferðavinnupolitikk fyri Tvøroyrar kommunu.

### Skjøl

- Móttøkuváttan frá Tvøroyrar kommunu
- Teldubræv frá Theresu T. Kreutzmann við uppskoti til ferðavinnupolitikk
- Ferdavinnupolitikkur 11 juni.docx
- Ferdavinnupolitikkur 11 juni við uppgávulýsing.docx

**81.00.00-A00-3-18**

## 10. Borgarstjórin hevur í uppskoti, at hækka aldursmarkið fyri kommunal starvsfólk til 70 ár

### Málsfrágreiðing

Kristin Michelsen, borgarstjóri, hevur í uppskoti, at hækka aldursmarkið fyri kommunalt sett starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu til 70 ár. Til umrøðu á býráðsfundinum.

### Avgerð

Málið verður beint í nevndirnar, sum koma við møguligum tilmælum.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**14.14.00-G01-1-17**

## 11. Rokning frá MEST í.s.v. eldsbrunan á Varðanum Pelagic 9. juni 2017

### Málsfrágreiðing

Petur Even Djurhuus, advokatur, hevur vegna fyritøkuna MEST sent Tvøroyrar kommunu rokning áljóðandi kr. 205.000,- í sambandi við hjálpina, ið skipið hjá MEST, Samson, veitti í sambandi við sløkkiarbeiði, tá eldur var í Varðanum Pelagic tann 9. juni 2017.

Tvøroyrar kommuna hevur svara advokatinum hjá MEST, at kommunan betalir ikki hesa rokning vísandi til, at átakið 9. juni 2017 í sambandi við hjálpina til Varðan Pelagic var á tilbúgvingarstigi 3, har tað er landið, sum hevur økisábyrgdina og betalir fyri uttanifrá komandi hjálp sambært ásetingum um hetta í tilbúgvingarlógini, sí viðfestu skjøl í málinum.

### Avgerð

Býráðið er kunnað um málið, og kunningin er tikn til eftirtektar.

### Skjøl

- Endaligt svar til Petur Even Djurhuus, advokat
- Fyribils svar til Petur Even Djurhuus, advokat
- Samskifti millum borgarstjóran og tekniska leiðaran
- Bræv frá Petur Even Djurhuus, advokati hjá MEST

**18.20.00-3-18**

## 12. Ávísa økið til Froðbiar Sóknar Róðrarfelag (FSR)

### Málsfrágreiðing

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Umboð fyri FSR vóru á fund við umboð fyri Tvøroyrar býráð og -kommunu tann 11. apríl í ár. Umboð fyri Varðan Pelagic luttóku eisini á fundinum. Hesin fundur við tí endamáli, at finna út av, hvar FSR nú skal halda til, tá neyst teirra ikki kann brúkast orsaka av útbyggingini hjá Varðanum Pelagic á havnarlagnum.

Borgarstjórin ynskir nú, at býráðið tekur støðu til eina staðseting av neystinum hjá FSR soleiðis at FSR síðani kann samráðast við Varðan Pelagic viðvíkjandi byggingini av sjálvum neystinum.

**Tilmæli**

Tekniska Nevnd 12. juni 2018: Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum, um at vísa á økið á Hvítanesi
vestanfyri gm 'Poul Hansen'- bygningin.

Borgarstjórin mælir til eisini at vísa á økið vestur í bátahylinum undir Tvørábakka.

**Avgerð**

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá borgarstjóranum, um eisini at vísa á økið vestur í bátahylinum undir Tvørábakka.
Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddu fyri.
Bjarni Hammer, Bogi Johannesen, Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest atkvøddu ímóti.

Atkvøtt varð um tilmælið frá Teknisku nevnd, um at vísa á økið á Hvítanesi vestanfyri gm 'Poul Hansen'- bygningin.
Einmælt samtykt.

**Skjøl**

- Bræv frá Tóka H. Niclasen til virkandi borgarstjóra Anitu Vibergsdóttir
- Móttøkuváttan í sambandi við kunning frá Bjarna Hammer
- Móttøkuváttan frá FSR
- Fundarfrágreiðing FSR



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**28.00.00-A00-1-17**

## 13. Viðurskifti við atliti til Snaruna

### Avgerð

Anita Vibergsdóttir skeyt upp at kommunan yvirtekur ognina og skipar virksemið.
Atkvøtt varð um uppskotið, og tað varð einmælt samtykt.

Mentarnarnevndin kemur við tilmæli um skipan av innihaldinum.
Yvirtøkan verður sett í gongd beinanvegin.

### Málsfrágreiðing

Aðalfundur hevur verið hildin í Snaruni við atliti til, at Tvøroyrar kommuna yvirtekur ognarskapin aftur av Snaruni.

**Sosiala nevnd, 28. marts 2018, pkt. 4:**
Sosiala nevnd er samd um, at Snaran verður eitt livandi hús og aktivt í mun til allar eldri borgarar í Tvøroyrar kommunu. Súsanna Bertholdsen setir seg í samband við HØFT og við formannin í sjálvsognarstovninum soleiði at tað verður arbeitt í felag fram ímóti einari loysn.

**Sosiala nevnd, 30. april 2018, pkt. 6:**
Súsanna Bertholdsen kunnaði um sítt samskifti við formenninar í eldrafeløgunum Snaruni og HØFT ávíkavist Dánjal av Rana og Jens Johannesen.

### Skjøl

- Viðtøkur fyri sjálvsognarstovnin Snaran v.m.
- Fundarfrásøgn 1/3-18

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**17.11.00-P00-1-15**

## 14. Val av nevndarlimum í Eftirskúlan

### Málsfrágreiðing

Arbeiða við at staðseta ein eftirskúla á Tvøroyri er byrjað. Borgarstjórin ynskir nú, at velja nevndarlimir í eftirskúlan.

### Avgerð

Málið verður flutt á lukkaðan fund.

### Skjøl

- Dagsordenspunkt: Umrøða verkætlanir eftirskúla/filmskúla í Suðuroy behandlet på mødet 9. april 2018 kl. 17:00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2018).docx
- Notat í.s.v. fund við umboð fyri eftirskúlan og filmskúlan
- Frásøgn frá fundi 9. mai 2018, send til fundarluttakarar
- Skrivlig frásøgn frá fundi í Hvalba 9. mai 2018



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 - |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin** **Fundur lokin** 18:00

Kristin Michelsen

Bjarni Hammer

Anita Vibergsdóttir

Bogi Johannesen

Alvi Mortensen

Kristina Roest

Susanna Bertholdsen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 7-2018 |
| Fundardagur | 14. juni 2018 kl. 15:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan